# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

**Oyggjablaðið næsta mikudag:**

## Fjarðastevna í Vestmanna

**Arbeiðsskúrar/summarhús**

2,5 x 7,4 m til støddar. Skúrarnir eru væl bjálvaðir og í góðum standi. Talan er um gang og tvey rúm afturat. Sengur og klæðnaskáp eru í skúrunum.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 566231**

# 1000 fólk um dagin

**VÁGUR Tað sær ikki út av so nógvum – Torgið, her mitt í Vági. Ein vanligur handilsbygningur uttan, men innan ein livandi handilsmiðstøð, har vágbingar og fólk í hundraðtali vitja hvønn einasta dag. – Vit hava í miðal væl omanfyri 1000 transaksjónir við kassarnar um dagin, sigur stjórin í Torginum, Arni Brattaberg.**

Snorri Brend

Mánadagin í farnu viku vóru liðin júst tvey ár, síðani henda handilsmiðstøðin læt upp – leygardagin 14. juni í 2008.

Eftir drúgva fyrireiking var nú komið so langt, at Arni Brattaberg kundi bjóða vælkomin inn í hesa fyrstu miðstøðina av slíkum slagi í oynni.

Nógv fólk var samankomið hesa løtuna, og kom tað ikki av ongum: Hetta er rætt og slætt fyrsti handil sum er bygdur sum ein slíkur, síðani Keypssamtøkan lat upp sín handil á Tvøroyri miðskeiðis í 80'unum.

- Vit kunnu í dag bara fegnast um, at fólk her í oynni hava tikið sera væl ímóti okkara tilboði, greiðir Arni Brattaberg frá. – Hygg bara, hasi sum standa í kø'ini við kassan beint nú. Annað teirra er úr Hovi og hin úr Sumba.

### Hart

Tað vóru kanska tey sum høvdu lítlar vónir um, at tað kundi bera til at byggja eina so snotuliga handilsmiðstøð í Vági.

Tey høvdu helst partvíst rætt í hesum. Latið varð upp í eini tíð sum var merkt av kreppu og arbeiðsloysi í sunnaru helvt av Suðuroynni.

Tað er helst so sum Arni Brattaberg sjálvur tekur til: – Vit fingu lán og bygdu í eini dýrari tíð, og lótu upp, tá kreppa var í landinum.

– Men vit hava so prógvað, at tað ber til at yvirliva við eini slíkari handilsmiðstøð í Vági. Tað hevur verið hart, men vit klára tað, slær hann fast.

Ein orsøk til hetta er uttan iva hon, at her í lítlu, men kortini sera rúmligu miðstøðini fær ein farið til handils í fleiri ymiskum handlum undir sama taki: Her er matvøruhandil, mótahandil við damuklæðum, gávubúð, vørur frá Sirri og ein kaffikrókur.

Eisini útlendingar vísa Torginum ans. Ein donsk kona kom á gátt, og greiddi hugtikin Arna Brattaberg frá, at hetta føldist sum at koma inn í ein terminal á einum flogvølli, tí her var so rúmligt.

– Hon hevði vist rætt í tí, sigur Arni við einum brosi.




**YVIRLIVAÐ**

*- Tað er ikki bara sum at siga tað, at hava eina handilsmiðstøð í Vági. Men tað ber til, sigur stjórin í Torginum, Arni Brattaberg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**ÚRVAL**

*Torgið hevur fleiri ymiskar handlar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*